Høng Gymnasium og HF

Á Høng Gymnasium hendur tað eisini naka, tá ið klokkan hevður ringt út



Gymnasium og HF – skeið við kostdeild.
Ring ella hygg á heimasíðu okkara.

www.hoeng-gymhf.dk
tlf.:+45 5885 2636

Góðir brúktir bilar

Nissan Almera 2.0 Diesel GX reyður, árg 1996, 4 hurðar, km 90.000, fyrr 72.000,- nú 69.000,-

Opel Corsa 1.2 grønur, árg. 2002, 5 hurðar, km. 31.000 v/mvg 99.000,-

Nissan Almera 1.8 Elegance bláur, árg 2000, 5 hurðar, km 52.000 99.800,-

Saab 9-3 TiD 2.2 svartur, árg 2001, 5 hurðar, km. 35.000 195.000,-

Nissan Primera 1.6 Player svartur, árg 1995, 4 hurðar, km 139.000, fyrr 67.000,- 59.000,-

Honda Accord 1.8i grønur, árg 1998, 4 hurðar, km. 69.000 110.000,-

Nissan Terrano 3.0 Di Sport Van grønur, árg 2002, 3 hurðar, km. 25.000 199.700,-

Honda Accord 2.0 gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 96.000, fyrr 155.000,- nú 129.000,-

Peugeot 206 XR 1.4 grønur, árg 2001, 5 hurðar, km. 58.000 108.000,-

Seat Cordoba 1.9 D Station Car gráur, árg 2000, 5 hurðar. km. 38.000, fyrr 109.000,- nú 99.000,-

Opel Astra 1.6 16V gráur, árg 2000, 4 hurðar, km. 52.000, fyrr 112.000,- nú 99.000,-

BMW 3 Serie grønur, árg 1987, 4 hurðar, km. 120.000 33.000,-

Opel Vectra 1.7 DT reyður, árg. 1996, 4 hurðar, km. 195.000 69.000,-

Ford Escort bláur, árg 1996, 4 hurðar, km. 54.000 59.000,-

Opel Vectra 2.0 DT Station Car svartur, árg 1997, 5 hurðar, km. 182.000, *sýn 24/03/04* 95.000,-

Renault Megane 1.6 grønur, árg 2000, 5 hurðar, km. 68.000 98.000,-

Opel Corsa 1.7DT Comfort gráur, árg 2002, 5 hurðar, km. 28.000 125.000,-

Hyundai Accent 1.5 AirCon gráur, árg 2000, 5 hurðar, km 92.000, sýnaður 14. mai 2004 89.000,-

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

Sosialurin 341800

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

## Fráboðan um umhvørvisgóðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 14. mai 2004, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**vindmyllum hjá SEV í Neshaga**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo. www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

www.sosialurin.fo

Visti tú ikki tað? Sosialurin

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3780
Navn: Sp/f Kósabúðin
Adressa: Stangavegur 90, FO-700 Klaksvík

Kommuna: Klaksvíkar Kommuna
Stovningardato: 10.05.2004
Viðtøkudato: 10.05.2004
Kapitalur: Kr. 101.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 101.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Hansina Hansen, Stangavegur 90, FO-700 Klaksvík.
Stjórn: Malena Andreasen, Uppsalagøta 37, 700 Klaksvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2004 - 31.12.2004
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og annað virksemi sum er tengt at hesum vinnum.

Skráseting Føroya tann 14. mai 2004

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3779
Navn: Sp/f Mentor
Adressa: Børkugøta 29, FO-100 Tórshavn

Kommuna: FO-100 Tórshavn
Stovningardato: 13.05.2004
Viðtøkudato: 13.05.2004
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Heini Hátún, Børkugøta 29, FO-100 Tórshavn.
Stjórn: Heini Hátún, Børkugøta 29, FO-100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: Sp/f Revisión, v/Kaj Joensen, Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 13.05.2004 - 31.12.2005
Endamál: Endamál felagsins er at veita leiðsluráðgeving til almennan og privatan sektor við atliti at gagnnýtslu av KT og framkomnum rakstrarhættum og skipanum, umfram annað virki í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 14. mai 2004

Kristin Balle

Minst til bilbeltið!
Helvtin av teimum, sum hava látið lív í ferðsluvanlukkum og ikki vóru í bilbelti, høvdu verið á lívi, um tey nýttu bilbeltið.
rff

Nýtir tú altíð blunkljósini?
Tað kann vera sera vandamikið ikki at gera tað.
Minst til at tendra blunkljósini í góðari tíð!
rff

Tá ið tú fert inn í eina kiosk ella handil at keypa, skalt tú seta bilin í høgru síðu.
Ber tað ikki til, mást tú venda bilinum.
- og minst til at sløkkja ljósini!
rff

Veitst tú, at tú skalt taka koyrikortið um aftur, um tú hevur meira enn 0,5 promillu av alkoholi í blóðinum?
Harumframt fært tú treytaðan dóm át missa koyrikortið, og dómurin er galdandi í 3 ár!
rff

Veitst tú, at tú skalt taka koyrikortið um aftur, um tú fremur týðandi brot á víkiskylduna?
Harumframt fært tú treytaðan dóm at missa koyrikortið, og, dómurin er galdandi í 3 ár!
rff



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Eli Smith á Hjalla



Tá brúktbilasølan Bilfríðkan læt upp á Hjalla leygardagin, var ein málningaframsýning hjá Eli Smith sýnd fram í framsýningarhølinum.

Talan er um nakrar málningar, sum eru gjørdir úr tilfari úr føroysku náttúruni og sum skulu sýnast fram í Helsingør og Frederiksværk seinni í ár.

Opið er frá mándag til fríggjadag millum kl. 8 og 16, og málningaframsýningin verður í tríggjar vikur.

## Grein 13 kanningar byrja komandi viku

**Politiið fer nú, sum undanfarnu ár, í holt við eitt átak – at kanna bilar við serligum atliti til píkadekk, trygdarbelti og um bilarnir annars eru í góðum standi**

TÍÐINDASKRIV

Eftir 1. mai er ikki loyvt at koyra við píkadekkum.

Politiið vil minna á, at ferðsla og trygd neyvan kunnu skiljast at. Tað er ikki nokk bert at kanna akfarið. Møgulig brek mugu rættast, líkamikið hvørji tey eru.

Tað er eisini ódýrari bert at gjalda umvælingina – og sleppa undan bótini.



Tær sokallaðu grein 13 kanningarnar hjá politinum byrja um alt landið mánadagin 24. mai 2004 og halda fram í 14 dagar.

Aftaná verða stakkanningar, men tá verður ikki sagt frá frammanundan.

## Eyðun Eliasen heldur fyrilestur um Eduardo Chillida

**Í kvøld heldur Eyðun Eliassen, arkitektur, fyrilestur um spanska listarmannin, Eduardo Chillida í Skálanum í Kommunuskúlanum í Havn**

FYRIELSTUR

Eyðun Eliasen, arkitektur, var í fjør í spanska partinum av Baskaralandinum á námsferð fyri at kunna seg um listamannin Eduardo Chillida.

Chillida (1924-2001) er so at siga ókendur um okkara leiðir, sjálvt um hann verður javnsettur fremstu listafólkini seinastu øldina.

Serliga hava skulpturar hansara vakt ans. Verkini hava eitt einfalt; men sera máttmikið skap. Spæl og kompositiónir av tí massiva mótvegis tí opna, meistrar Chillida sum fáur. Hesum evni arbeiðir hann við í allari síni list. Í bygningum, skulpturum, stórum sum smáum. Á eldri døgum førdi hann sama evni inn í pappírs- og klæðisverk.

Eduardo Chillida las byggilist í nøkur ár; men gavst. Hann vildi arbeiða leysari av nýtslukrøvunum innan byggilistina og legði tí á listarliga bógvin. Listaverk hansara hava tó flest øll rót í byggilistini. Summi í tilfari og viðgerð, onnur í stødd og sambandi við umhvørvið. Býar- sum landslagsumhvørvið.

Eitt av seinastu stórverkum hansara er ein verkætlan við stórbærum rúmum inni í fjalli á Kanarisku oyggjunum.

Fyrilesturin er almennur og ókeypis verður í Kommunuskúlaauluni í Havn, týsd. 18. mai, kl. 19:30.

Kveiki, ein tiltaksbólkur undir Arkitektafelag Føroya, skipar fyri fyrilestrinum.

### Dagurin

**18. mai. Eirikur,** deyður umleið 1160. Svenski kongurin Eirikur IX Jeðvarðson, sum varð myrdur av danska prinsinum Magnusi og hansara monnum í Uppsala dómkirkju. Eirikur varð virdur sum svenskt tjóðhalgimenni alla miðøld.

Navnið er norrønt og merkir *hann sum ræður eina ella æviga.*

### Minningarorð um abba mín

## Viggo Alfred Kjærbo

**11.10.1920 20.04.2004**



Góði abbi. Tað verður aldri tað sama at koma til Sumbiar aftur og ikki kunna síggja teg standa í durinum og taka ímóti mær, tá eg komi suður at vitja. Tað verður undarligt at fara oman í køkin á døgurðatíð og ikki síggja teg standa í klædningsbuksum, undirtroyggju og kolli og rokast við at fáa døgurðan lidnan til tíðina. Ja, tað var tín uppgáva og eingin slapp at taka hana frá tær. Og hana røktaði tú væl, líka til tann dagin tú fór úr Sumba fyri síðstu ferð.

Tá alt var liðugt plagdu vit bæði at taka okkum av uppvaskinum, tú vaskaði upp og eg turkaði av. Tá plagdu tú ofta at siga hesi orð: »Ogor beði skuldi fari og arbeitt á einum hotelli, tey hevði ikki fingið betri arbeiðsfólk, sjálvt um annað er hálvavegna ørt…« Tá kundi eg ikki lata vera at smírast. Men soleiðis vart tú, altíð klárur við onkrum stuttligum kommentari.

Tað, sum eg altíð gleddi meg mest til, var eftir at alt var »fallið til ró«. Tá plagdu vit at seta okkum at práta um ymiskt. Tú var altíð líka interesseraður at lurta eftir mær, tá eg spurdi og bað teg fortelja mær um tíni ungdómsár undir krígnum. Eftir eina løtu fekk eg altíð eina stuttliga og spennandi søgu at hoyra. Ja, tað var mangan at eg flenti leingi eftir somu søgu, oftast allan dagin.

Men nú ert tú farin, eg kann ikki rættiliga fata tað. Men eg kann samstundis gleðast um, at tú endiliga hevur fingið frið og at tú nú ert heima, har sum tú altíð tosaði um. Tað, sum lá tær so nær á hjarta: at sleppa heim til himmals at møta Gudi, andlit til andlit, og møta teimum, sum stóðu tær nær í lívinum, tína elskaðu konu, sum fór undan tær. Nú eru tit endiliga saman aftur.

Tað er ikki so lítið, sum eg havi lært av abba mínum. Og eg fari altíð at minnast ta tíðina, eg hevði saman við honum, sum eina ríka tíð, fulla av minnum, sum eg ikki hevði viljað býtt um við nakað her á jørð.

Men ein troyst er tó, ein dag skulu vit møtast aftur. Men inntil tá eru tað minnini, sum altíð, saman við abbanum, fara at liva víðari inni í mær.

**Vanja C. Joensen**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum tykkum, ið mintust okkum á silvurbrúdleypsdegnum 5. mai.

**John og Ingvør**